## Lítil valluttøka

Valluttøkan á svenska ríkisdagsvalinum sunnudagin var tann minsta síðani seinna heimsbardaga. Bara 79 prosent av veljarunum settu kross. Fyri fýra árum síðani var luttøkan 81,4 prosent.

Svenskir valgranskarar bera ótta fyri, at tann minkandi vallutøkan hevur samband við sosialan ójavna í samfelagnum, sum ber í sær, at summir minnilutar leggja ikki í at fara á val. Kanningar benda eisini á, at tað eru serliga tey fíggjarliga veikastu í samfelagnum, sum ikki nýta valrættin.

Granskararnir halda eisini, at fólk við varandi sjúku og fólk av fremmandum uppruna kenna seg sett uttan fyri samfelagið, og at tey tí ikki leggja í at fara á val.

## Andstøðan vann

Tað vóru ikki bert sviar, sum vóru á vali sunnudagin. Í Makedonia var eisini tjóðartingsval, og har eins og í Svøríki gjørdust sosialdemokratarnir størsti flokkur.

Sambært myndugleikunum fingu sosialdemokratarnir 41 prosent av atkvøðunum, meðan tann høgrasinni tjóðskaparflokkurin, sum hevur sitið við valdið, fekk bert 24 prosent. Úrslitið ber í sær, at Makedonia fær eina nýggja mið-vinstra stjórn.

Valúrslitið vísti eisini, at millum teir albansku veljararnar fekk flokkurin hjá fyrrverandi uppreistrarleiðaranum Ali Ahmeti nógv flestar atkvøður. Ahmeti var politiskur leiðari í albansku mótstøðurørsluni UCK, sum seinasta summar skipaði fyri uppreistri ímóti makedonska stjórnarherinum.

## Vandamikil eldur

Sunnukvøldið kom eldur í eitt farmaskip, sum var statt í Ermasundi einar átta fjórðingar úr ensku strondini.

Tað frættist skjótt, at skipið hevði ein vandamiklan farm, sum er í bingjum, og enska sjóverjan setti alt fyri eitt sløkkiliðsmenn umborð á skipið. Nakað seinni varð boðað frá, at sløkkiliðsmenninir høvdu fingið tamarhald á eldinum, og at eingin vandi var fyri lastini.

Farmaskipið »Wester Till« er skrásett í St. Johns í Antigua, men tað er týska felagið triton, sum rekur tað. Felagið segði í gjár, at skipið var á veg til Tunis, men einki varð sagt um, hvar tað er fyri farmur, skipið hevur.

## Illa umtóktur ráðharri

Helmingurin av fólkinum í Norðurnoregi eru misnøgd við Svein Ludvigsen, fiskimálaráðharra og tað, sum hann hevur fingið av skafti, síðani hann gjørdist ráðharri. 26 prosent av teimum spurdu halda, at ráðharrin hevur gjørt eitt gott arbeiði.

Sjálvur er Svein Ludvigsen væl nøgdur við úrslitið av kanningini. Hann sigur, at tá hugsað verður um, hvussu nógv fjølmiðlarnir hava funnist at sær, kann hann ikki vera annað enn nøgdur við, at fjórði hvør norðurnorðmaður framvegis styðjar hann.

Eitt annað, sum frøir ráðharran er, at sambært somu kanningini eru nógv av teimum ungu væl nøgd við tað, sum hann hevur sagt og gjørt.

# »Sossarnir« halda fram

**Svensku sosialdemokratarnir fingu nógv størri undirtøku enn væntað og halda fram í stjórn**

SVENSKA VALIÐ
*Árni Joensen:*

– Gøran. Gøran. Gøran.

Lógvabrestirnir rungaðu í valhølinum hjá sosialdemokratiska flokkinum í Stockholm sunnukvøldið, tá tað var vorðið greitt, at flokkurin hevði fingið eitt nógv betri valúrslit, enn veljarakanningarnar høvdu sagt.

Tann einasti, sum ikki tóktist ovfarin av úrslitinum, var forsætisráðharrin sjálvur.

-– Eg kendi tað á mær, tí eg fekk varhugan av hesum ta seinastu vikuna upp undir valið, segði ein fegin Gøran Persson.

Sosialdemokratarnir fingu 40,1 prosent av atkvøðunum ímóti 36,4 prosentum á valinum fyri fýra árum síðani. Fyrrverandi kommunistarnir, Vinstri, fekk 8,4 prosent og Umhvørvisflokkurin 4,6 prosent. Saman hava teir tríggir flokkarnir 191 av teimum 349 tingsessunum.

Sosialdemokratunum og Vinstra vantar bert ein tinglim í at hava meiriluta einsamallir, og tað er ikki óhugsandi, at fínteljingin kann geva teimum ein tinglim afturat.

Teir borgarligu og serliga formaðurin í Fólkaflokkinum, Lars Lejonborg, róðu sunnukvøldið upp undir at fáa Umhvørvisflokkin at stuðla eina borgarliga stjórn, men politiskir eygleiðarar í Stockholm siga, at hesin møguleikin er lítil og eingin. Ein av talsmonnunum hjá Umhvørvisflokkinum, Peter Eriksson, segði, at mál floksins er at skipa stjórn saman við sosialdemokratunum.

Umhvørvisflokkurin hótti í valstríðnum við at fella eina sosialdemokratiska stjórn, fekk flokkurin ikki ráðharrasessir í stjórnini, men eygleiðarar vænta kortini ikki, at flokkurin fer at gera álvara av hóttanini.



*Gøran! Gøran! Gøran! Lógvabrestirnir mundu ongan enda tikið, tá svensku sosialdemokratarnir fingu eit nógv betri valúrslit sunnukvøldið enn væntað*

### Upp og niður

Hjá teimum borgarligu flokkunum royndist valið ymiskt. Fólkaflokkurin fekk sum væntað sera stóra framgongd og fór úr 4,7 upp í 13,2 prosent av atkvøðunum. Men tann stóra framgongdin hjákpti ikki tí borgarliga vonginum stórvegis, tí meginparturin av framgongdini hjá Fólkaflokkinum kom frá hinum borgarligu flokkunum. Soleiðis mistu Moderatarna nógv og fór úr 22,9 niður í 15,2 prosent, meðan Kristiligu demokratarnir fóru úr 11,8 niður í 9,2 prosent av atkvøðunum. Miðflokkurin hevði haafturímóti eina lítla framgongd.

# Irak hevur skjótt kjarnorkuvápn

**Ein irakskur kjarnorkuserfrøðingur, sum rýmdi av landinum fyri átta árum síðani, heldur, at Irak verður ført fyri at gera eina kjarnorkubumbu nógv fyrr, enn vesturlendskir leiðarar halda**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Khidir Hamza, sum flýddi úr Irak fyri átta árum síðani, sigur við bretska blaðið The Times, at irakar eru uttan iva komnir munandi longur við at gera ta fyrstu kjarnorkubumbuna, enn teir politisku og hernaðarligu leiðararnir í Vesturheiminum halda.

Khidir Hamza vil vera við, at irakskir serfrøðingar hava eftirgjørt eina týska sentrifugu, sum verður nýtt til at ríka uran. Vápnaeftirlitsmenninir hjá ST oyðiløgdu ta týsku sentrifuguna, áðrenn teir fóru úr Irak í 1998, men Khidir Hamza sigur, at irakar hava fleiri eftirgerðir av týsku sentrifuguni.

– Vit tóku fleiri sjónbond av sentrifuguni, tá hon varð sett upp, so vit kundu vera førir fyri at gera okkara egnu eftirgerðir, og eg eri vísur í, at tað finnast fleiri hundrað slíkar eftirgerðir í Irak í dag, sigur kjarnorkuserfrøðingurin við The Times.

Sambært blaðnum tekur tað millum fýra og sjey ár at ríka nóg mikið av urani til eina kjarnorkubumbu, og hildið verður, at iraksku serfrøðingarnir hava arbeitt við hesum seinastu fýra árini.

Tann viðurkendi bretski kanningarstovnurin IISS segði herfyri, at fær Irak fatur á tí neyðuga tilfarinum, kann landið gera eina kjarnorkubumbu eftir fáum mánaðum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri hjálpsemi
og sýnda samkenslu tá ið góða mamma,
vermamma, omma og langomma okkara

**Salmina Johannesen**

andaðist og fór til gravar.

Tøkk til tykkum á Gerðis- og Áargarði,
til prestin Jákup R. Hansen, til sangarar og gravarar
og til øll, ið á einhvønn hátt hjálptu til
við jarðarferðina og ervi.

Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir
og til tykkum øll, ið fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Vigdis, Sigrun, Anna, Regin og Halldis**

## Tøkk

Øllum tykkum, ið so hjartaliga gleddu meg í samband við 80 ára føðingardagin, veiti eg mína bestu tøkk.

**Heilsan**
**Betta Eið, Hvalba**




r o ø ør



sp/f KBI
Postboks 354 - FO-700 Klaksvík
Fartlf. 214406 · Tlf. 458606 - Faks 458706





Deildarleiðari til ALS

Loftar tú við nógvum bóltum?

Varðveitir tú yvirlitið, hóast tú hevur nógvar bóltar í luftini? Hevur tú evnini at stíla fyri og samskipa? Og torir tú at bróta upp úr nýggjum?

So hevur tú nakrar eginleikar, vit sóknast eftir. Starvið sum leiðari á Tryggingar- & ávísingardeildini er leyst at søkja. Talan er um eitt áhugavert starv við nógvum og fjølbroyttum uppgávum.

Tryggingar- & ávísingardeildin, sum í løtuni telur 10 starvsfólk, umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, flyting millum A-kassar, arbeiðsávísing, førleikagevandi tiltøk og Barsilsskipanina.

Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum er at leiða og skipa dagliga arbeiðið á deildini. Saman við stjóranum og leiðaranum fyri Fíggjar- & fyrisitingardeildina myndar deildarleiðarin á Tryggingar- & ávísingardeildini eisini leiðsluna á ALS.

Starvið er fjølbroytt við nógvum avbjóðingum, og tí krevst, at deildarleiðarin hevur hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir. Gott innlit í samfelagsviðurskifti og kunnleiki til føroyska arbeiðsmarknaðin er ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Starvið verður sett sum skjótast. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 21. oktober 2002.

Umsóknir skulu stílast til Elisabeth O. Gaardbo, stjóra á ALS. Hon sigur tær eisini fegin meira um starvið, um tú spyrt á telefon 34 95 50.

ALS
Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo





I-net CLASSIC

o Stovnan: Ókeypis

o Mánaðargjald: 0,-

o Tú sleppur á alnótina frá øllum teldum, ið hava telefonsamband

o Inet-hjálp frá kl. 08 - 20 á Tel 902121 *

Við I-net CLASSIC fært tú eisini virusskannað allan tín teldupost; pláss á ambætaranum hjá Føroya Tele til tína egnu heimasíðu; atgongd til allar upplýsingar um tína nýtslu á alnótini.
*Inet-hjálpin svarar millum kl. 08 - 20 og kostar 5 kr/min kl. 08 - 18 og 8,75 kr/min kl. 18 - 20 umframt uppringingargjald á 5 kr.

Fyrivarni verður tikið móti prentvillum.

I-net INTERNETLOYSNIN

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum